inning r rð u u ur uus

fø a r avn y , ra go u

Elly, í familjuhøpi oftast bert nevnd Elly-omman, andaðist týskvøldið 16. januar aftaná stutta sjúkralegu. Ikki tí, árini vóru mong, og hon hevði frammanundan havt ymist strik, ernaðist aftur so hvørt, men at enda beið so ikki bøtur.

Og sum eg segði við læknan andlátskvøldið, at hon annars var eitt so hendinga raskt, lívshugað og birgt fólk, so segði hann einki vera at gera, hóast tey royndu.

Tað er verðsins gongd, at fólk leggja árarnar inn fyrr ella seinni og ikki minst í framkomnum aldri, men hjá avvarandi er tað ofta óvæntað, og tíðliga, tí at vit ikki vilja síggja í eyguni, at árini kortini eru vorðin so mong. Og í Elly-ommusa føri er tað ikki so løgið, so hugfarslig hon var sjálvt á gamalsaldri.

Henni untist í allari giftuni at vera heima at ansa manni og børnum og síðani ommubørnum og gjørdi alt við áhuga, hegni og til lítar, arbeiðssom og hartil fitt í hondunum.

Hjá okkum, sum komu inn í hennara lív, var hon altíð blíð og fyrikomandi og ótrúliga hjálpsom. Og nú á hennara deyðslegu saknaði eg at síggja hennara troyttu og slitnu hendur, sum gjøgnum árini høvdu dugnað so mongum í familjuni við máltíðum og pløggum ella drekkamunnum afturvið avsvalandi, vinsomum og skemtingarsomum práti og brosum, ikki upp á hennara treytir, men upp á okkara treytir í tí og tí løtuni.

Elly var til tað seinasta klár og við uppá tað. Tað gjørdi, at hon var hugalig at vera saman við, bæði hjá okkum tilkomnu og ikki minst teimum yngru í familjuni, sum eins og eisini fremmandabørnini kring summarhúsið forguðaðu hana, tann tíð tað var, tá tað stóð upp á pannukakur í langum banum.

Sjálvur minnist eg bara gott um hesa gomlu og nú í mínum føri farnu vermóður, og minnist meg ikki tvørt orð hava verið okkara millum.

Mannalív sínamillum snýr seg m.a. um samskifti, um lívið her á fold saman við hvørjum øðrum upp á gott og ónt. Og í so máta hevur lívið saman við Elly verið yvirhøvur ómakaleyst og positivt, tí at hon sjálv hevur verið so positiv, forstandandi og lívsjáttandi. Og hjá børnum og ommubørnum hevur hon verið ein fongur at fara á gátt hjá, tí hon hevur verið so opin, blíð og fyrikomandi og kravlítil at vera hjá.

Nú Elly umsíðir, troytt og mett av døgum hevur fingið frið aftan á eitt langt lív sum familjumenniskja, rennur mær til hugs, at tá eg afturkomin í heimið týsnáttina fór inn í hennara køksskáp og skuldi turka mær um hendurnar kom eg í fløkju við álmanakkan hjá henni, har deyðsdagin tann 16.01 stóð skrivað skriftorðheilsanin: »Tann, ið trýr á Sonin hevur ævigt lív«. Og lat tað so vera okkara alra heilsan til Elly-ommuna handan evstu sýn og teimum nærmastu til troyst og ugga.

ri ur v ri vi inn inu u y o una

Vit á Ternuryggi

VIÐMERKINGAR

Barnsburðarskipanin má betrast fyri tey lágløntu

Hans Pauli Strøm
avna arting a ur

Í umrøðuni, sum higartil hevur verið av uppskotinum til nýggja lóg um barnsburðarskipan, hevur mest verið gjørt burtur úr tveimum av teim óhepnu avleiðingunum, nevnliga: dupultgjaldið hjá almennu starvsfólkunum, og útihýsingin av heimaarbeiðandi.

Eg haldi tó at tað eru onnur viðurskifti í lógaruppskotinum, sum tað er av minst líka stórum ella størri týdningi at rætta. Fyrst og fremst:

- Útrokningargrundarlagið er til ógagns fyri tímalønt og onnur láglønt,
- Lágmark eigur at setast fyri útgjaldinum, og
- Tað eigur at vera ein almenn arbeiðsgevarafíggjað skipan.

Útrokningargrundarlagið

Eftir §12 í uppskotinum skal grundarlagið fyri útrokningini av barnsburðarpeninginum vera miðal A-inntøkan teir 12 seinastu mánaðirnar undan barnsburðarfráveruni. Serliga fyri tímaløntu og lágløntu arbeiðskvinnurnar, sum hava størsta tørvin á eini nýggjari barnsburðarskipan, hevur hetta óhepnar avleiðingar. Tær hava ikki einans ta lægstu lønina, men ofta eisini sera óstøðugt arbeiði. Hjá nógvum teirra er mangan, at tey ikki fáa fulla arbeiðsviku, tíansheldur at tey fáa fulla arbeiðsmánað. Ein og hvør dugir at skilja, at skal útgjaldið roknast eftir miðalinntøkuni fyri teir síðstu 12 mánaðirnar, so kann verða ein veldugur munur á barnsburðarpeninginum hjá tí ófaklærda arbeiðsfólkinum og teimum í góðum, føstum starvið.

Tí má útrokningargrundarlagið broytast, so sum eisini Føroya Arbeiðarafelag vísir á í sínum viðmerkingum til uppskotið, »soleiðis at lógin fyrst og fremst verður ein bati fyri vanliga ófaklærda arbeiðsfólkið, tí tað er her tørvurin fyri eini dagførdari skipan er størstur«. Og tað eru nógvir mátar at broyta útrokningargrundarlagið eftir hesum. T.d. sum fleiri av feløgunum skjóta upp, at útgjaldið verður eftir starvssetanini: ert tú í fulltíðarstarvi, fært tú fullan dekning, ert tú í parttíðarstarvi, fært tú samsvarandi partvísan dekning.

Lágmark á barnsburðarpeningi

Eftir lógaruppskotinum kann barnsburðarpeningurin ganga líka niður í tað, sum svarar til eina arbeiðsviku upp á 4 tímar. Til teirra sum eru niðanfyri, verður onki útgoldið. Men hetta markið, sum er uppá 10% av eini arbeiðaraløn, er púra burturvið. Hvat er meiningin við einum endurgjaldi niður móti 350 kr um vikuna?

Nei, her eigur, sum ávíst av fleiri av feløgunum, at ásetast eitt sømiligt lágmark, sum barnsburðargjaldið ikki skal fara niðurum. Hesa minstuupphæddina skulu øll í hvussu so er fáa, uttan mun til inntøku.

Ein bólkur við 12 fakfeløgum grundgevur væl fyri hesum í sínum viðmerkingum:

»Aðalendamálið eigur at vera, at skapa familjum, sum sum fáa børn ella ættleiða børn, rímiligar fíggjarligar umstøður, tí hetta er ein av fyritreytunum fyri, at nýføddu børn okkara og tey børn, sum vera ættleidd, fáa eina góða byrjan í lívinum. Tí meta vit, at lágmark eigur at verða sett í sjálva lógina, soleiðis at skaptar verða best møguligar rammur fyri tær familjur, sum hava ábyrgdina av teimum nýføddu børnunum.«

Ein almenn arbeiðsgevarafíggjað skipan

Higartil hava vit havt eina skipan á almenna arbeiðsmarknaðinum, har arbeiðsgevarin hevur goldið starvsfólkunum fulla løn í barnsburðarfarloyvi. Henda skipan hevur virkað væl við at hesir arbeiðsgevarar hava goldið í ein grunn, sum javnaði útreiðslurnar teirra millum. Á privata arbeiðsmarknaðinum hevur landskassin gjørt tað møguligt hjá løntakarum at fáa eitt avmarkað endurgjald eftir dagpeningalógini.

Nú skulu hesar skipanir takast av, landskassin verður partvíst sleptur undan sínum skyldum, og við nýggju skipanini, sum skal fevna um allan arbeiðsmarknaðin, skulu løntakarar nú inn at gjalda aðra helvtina av einum eykaskatti upp á 0,50%, og arbeiðsgevarar sleppa við at gjalda hina helvtina.

Tað rætta hevði í staðin verið, at tann almenna barnsburðarskipanin varð víðkað til allan arbeiðsmarknaðin, so at skyldan til at gjalda varð verandi har, hon eigur at vera: nevnliga hjá arbeiðsgevarunum, teim almennu og teim privatu, sum tóku á seg at gjalda tey 0,50% av øllum útgoldnum lønum í ein felags barnsburðargrunn, og harvið javnaðu útreiðslurnar sínámillum.

Ein stigvís longing av farloyvisskeiðinum

Tað eru onnur viðurskifti í uppskotinum, sum eisini ivi kann vera um – m.a. er neyvan rætt at umsitingin av barnsburðarskipanini skal leggjast til ALS, sum heldur fult og heilt eigur at røkja sína uppgávu sum trygging hjá teim arbeiðsleysu og meira aktivur arbeiðsávísingarstovnur.

Ein meira positiv broyting kundi verið, at møguleiki varð fyri at longja tíðarskeiðið í barnsburðarskipanini út um tær 24 vikurnar í uppskotinum. Tað hevði verið eitt týdningarmikið familjupolitiskt framstig, um farloyvistíðin eftir nøkrum árum kundi verið longd, fyrst úr 24 upp í 36 vikur, og síðani úr 36 upp í 48 vikur.

Atfinningarnar kunnu gera uppskotið betri

Sum ávíst omanfyri er tað ikki tann samhaldsfasta hugsjónin, sum eyðkennir uppskotið til nýggja barnsburðarskipan. Tað er serliga hetta sum fakfeløgini hefta seg við í teirra atfinningum. T.d. taka tey 12 fakfeløgini (m.a. Starvsmannafelagið, Skipara- og Navigatørfelagið, Pedagogfelagið, Sjúkrasystrafelagið, Lærarafelagið o.s.v.) soleiðis til í sínum viðmerkingum:

»Umframt onnur lógaruppskot, sum verandi samgonga hevur gjørt, eru feløgini samd um, at rákið í førda politikkinum tykist at vera, at alsamt fleiri av teimum uppgávum og skyldum, sum tað almenna hevur havt, skulu leggjast út á borgararnar sjálvar, við tí avleiðing at samhaldsfestið í samfelag okkara alsamt verður máað burtur, við teimum óhepnu avleiðingum hetta kann fáa, ikki minst fyri tey, ið frammanundan eru verst fyri í samfelag okkara.«

Tað nýtist ikki at ganga so. Teir flestu flokkarnar á tingi vístu á fleiri ymisk viðurskifti í hesum lógaruppskoti, sum kundi gera tað betri. Og við eini góðari nevndarviðgerð kann tað avgjørt gerast eitt stórt arbeiðsmarknaðar-, sosial-, familju- og javnstøðupolitiskt framstig. So at vit við nýggju lógini fáa eina barnsburðarskipan, sum tekur allan arbeiðsmarknaðin við – tvs. at tímalønt, ófaklærd og onnur á privata arbeiðsmarknaðinum nú fáa sjálvsøgd rættindi, sum higartil hava verið eitt privilegium hjá almennum starvsfólkum.

Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

ítróttur

Nr. 17 • hósdagur • 25. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Tað gongur seint at skifta felag

Fleiri av spælarunum, sum í aðru viku fara til Svøríkis við landsliðnum, eru skrásettir í øðrum feløgum enn teimum, sum teir fara at umboða í hesum kappingarárinum

LANDSLIÐ
Jóannes Hansen

Listin við teimum átjan landsliðsspælarunum, sum fyrst í aðru viku skulu til Svøríkis at standa í andglettinum, líkist sær sjálvum. Talan er so at siga bara um tordenskjoldssoldátar. Føroyska ferðalagið fer úr Føroyum mánadagin 29. januar. Ferðast verður umvegis Keypmannahavn. Dysturin ímóti Svøríki verður spældur mikudagin 31. januar klokkan 18.00. Hann verður spældur í innandura høll í Växjö.

Pól Thorsteinsson er við aftur, eftir at leikbannið frá Kekkia dystinum í fyrraárið helt honum burtur í fjør (og fer at halda honum uttanfyri í Luksemburg í mars). Merkisvert er tað, at Christian Høgni Jacobsen nú hevur vunnið sær pláss ímillum teir fyrstu átjan. Hann er einasti maður í átjan manna hópinum, sum enn ikki hevur spælt á landsliðnum.

Í fyrsta umfari hevur Allan Simonsen sent boð eftir hesum spælarunum: Fróði Benjaminsen, Hans Fróði Hansen og Øssur Hansen úr B68. Jóhannis Joensen og Allan Mørkøre úr HB, Rógvi Jacobsen, KÍ og Christian Høgni Jacobsen úr NSÍ. Hinir ellivu spælararnir eru – sambært kunngjørda listanum – skrásettir í útlendskum feløgum. Teir eru Uni Arge, Akranes, Sámal Joensen, Jens Martin Knudsen og John Petersen, Leiftur, Pól Thorsteinsson, Valur, Julian Johnsson og Kurt Mørkøre, Sogndal, Óli Johannesen, Hvidovre, Johan B. Hansen, OB, Jákup Mikkelsen, Herfølge, og Todi Jónsson, FCK.

Tað er longu nú greitt, at í hvussu so er eitt avboð verður. Talan er um Julian Johnsson, sum sunnudagin breyt beinið. Ivaleyst verður fyrsti eykamaðurin og aðrir eykamenn, um onkrum av hinum fer at berast frá, funnin millum teir spælararnar, sum vóru á venjingarleguni á Svangaskarði næstsíðsta vikuskifti, og sum eisini eru úttiknir til venjingarleguna, sum ætlanin er at hava í Gundadali annað vikuskifti. Teir spælararnir eru Magnus Poulsen og Arnbjørn Danielsen, B68, Jákup á Borg, B36, Tór–Ingar Akselsen, FS Vágar, Andrew av Fløtum, HB og Heðin á Lakjuni, KÍ.

Jan C. Dam varð upprunaliga úttikin til venjingarleguna, sum fyrr í mánaðinum var á Svangaskarði. Hann gav avboð, tí hann er í starvsvenjing í Danmark.

Ikki dagførdir

Tvey nøvn, sum mest sum hvørja ferð hava verið á landsliðslistanum síðani 1994, eru ikki við hesa ferð. Talan er um liðformannin Jens Kristian Hansen og um Henning Jarnskor. Jens Kristian Hansen er plágaður av skaða í fótinum, tí er hann ikki úttikin. At Henning Jarnskor ikki er á listanum hava vit ikki aðra frágreiðing uppá, enn at landsliðsvenjarin ikki ætlar at brúka hann.

Onkur heldur ivaleyst, at tað hevði verið upplagt, at venjarin valdi Súna Olsen, sum er yrkisspælari í Hollandi, og sum verður roknaður at vera upplagt framtíðar evni til landsliðið, men tað hevur Allan Simonsen ikki gjørt.

Annars er tað sjónskt, at tað gongur illa at fáa skrásett flytingar millum feløgini. Tað sigst vera greitt, at Rógvi Jacobsen skal spæla við HB og at Heðin á Lakjuni skal spæla við B36. Báðir standa at umboða KÍ. Arnbjørn Danielsen skal spæla við B36, men hann stendur framvegis at umboða B68.

NSÍ hevur gjørt avtalu við Jens Martin Knudsen, men sambært FSF yvirlitinum er spæliloyvið hjá honum í Leiftri. Pól Thorsteinsson hevur sagt, at hann fer ikki aftur til Val, men spæliloyvið hjá honum er framvegis í Reykjavík. Nógv prát er um, hvussu tað verður við Sámali Joensen og John Petersen. Vit kunnu staðfesta, at spæliloyvið hjá teimum báðum framvegis er á Ólafsfirði.

Hans Fróði Hansen og Óli Johannesen hava skift felag, síðani landsdystin í Sveis. Í yvirlitinum hjá FSF sæst, at spæliloyvini eru flutt frá Sogndal og til B68 og frá AGF og til Hvidovre.

Julian hevur brotið beinið

Ágrýtni miðvallarin skal ganga við gipsi næstu seks vikurnar og verður tískil ikki við í landsliðsferðalagnum til Svøríkis í komandi viku

LANDSLIÐ
Jóannes Hansen

Listin við spælarunum, sum í komandi viku skulu við landsliðnum til Svøríkis, er almannakunngjørdur. Millum sjálvskrivaðu nøvnini er Julian Johnsson. Men Julian fer ikki við landsliðnum til Svøríkis, og tað er møguleiki fyri, at hann heldur ikki verður tøkur, tá landsliðið seinnapartin av mars mánað skal spæla HM undankappingardystir í Luksemburg og Russlandi.

Julian hevur brotið beinið. Mánadagin varð hann gipsaður, og boðini frá læknanum vóru, at gipsið ikki fer av aftur fyrrenn um seks vikur. Tað vil við øðrum orðum siga, at sjøtul gott og væl verður sett á mars mánað, áðrenn Julian Johnsson aftur kann fara undir venjingina.

Sunnudagin spældi Sogndal venjingardyst á útivølli ímóti Brann. Dysturin varð spældur í Vestlandshallen. Tá eitt korter var farið, lá Julian á graslíkinum. Tað tóktist sum um hann hevði pínu, men hann treiskaðist, reisti seg aftur og var við allar 90 minuttirnar.

Pínan hvarv ikki, og eftir røntgenkanningar mánadagin staðfesti læknin, at eitt bein í øðrum fótinum var brotið, og at tað fór at verða neyðugt við seks vikum í gipsi.

– Tað er sera harmuligt, at vit hava mist ein av týdningarmiklastu spælarunum. Vit fyrireika okkum til nýggja kappingarárið í tippuliguni, og tað kemur illa við, at ein av monnunum, sum hevur royndir av at spæla í bestu deildini, nú er settur uttanfyri í so langa tíð, sigur Torbjørn Glommes, sum er venjari í Sogndal.

Ikki nóg búnir

Venjingardysturin sunnudagin vísti, at enn restar tað nógv í hjá Sogndal, áðrenn teir eru nóg væl fyri at standa seg í bestu deildini. Úrslitið var 6–2 til Brann, men tað var ikki fyrrenn síðsta korterið, at tað skrædnaði.

Sogndal var tvær ferðir á odda. Kurt Heggestad skoraði bæði málini. Tað er ikki føroyski máltjóvurin í Sogndal, Kurt Mørkøre, sum hevur skift eftirnavn. Talan er um norskan U–18 landsliðsspælara, sum teir í Sogndal rokna nógv við.

Venjarin hevur hesa frágreiðingina til, at góða gongdin fyrstu 75 minuttirnar sunnudagin endaði við stórtapi:

– Vit eru ikki nóg búnir til at spæla í tippuliguni. Tað gekk væl størsta partin av tíðini, men so var tað týðuligt, at okkara spælarar vóru troyttir. Teir hugsaðu ikki nóg klárt síðstu løtuna. Mistøkini vóru fleiri, og teir í Brann sektaðu tey eirindarleyst, sigur Torbjørn Glommes, sum kortini sigur seg vóna, at nógva og miðvísa venjingin fer at at síggjast aftur seinni í ár.

Næsti venjingardysturin hjá Sogndal verður sunnudagin 11. februar. Hann verður á heimavølli í Sognhallen og mótstøðuliðið verður Ålesund.

Stórur áhugi fyri Jákupi

Tað er ikki sørt, at donsku miðlarnir gera nógv burtur úr føroyska landsliðsmálverjanum, nú sáttmáli hansara við Herfølge er um at renna út

YRKISFÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

- Nei í løtuni er einki soleiðis ávegis.

Nakað soleiðis svarar føroyski landsliðsmálverjin, Jákup Mikkelsen, tá vit mikumorgunin spurdu, um nakað nýtt var hent við framtíðarstøðu hansara.

Síðani hann fyri viku síðani setti seg sjálvan á sølulistan hjá Herfølge, hava donsku fjølmiðlarnir gjørt nógv burtur úr málverjanum, og bæði í bløðum, á alnetinum og týskvøldið í sjónvarpinum hevur verið roynt at fingið viðmerkingar frá honum. Millum annað varð nógv gjørt burtur úr einum møguligum skifti til FCK, eftir at hann í svari til heimasíðuna, FCK-online, segði, at tað hevði hann avgjørt verið áhugaður í, um teir komu við einum tilboði.

Hugsar seg um

Sum sagt, so hevði Jákup eingi nýggj boð at bera okkum mikumorgunin. Hann greiðir frá, at hann var á fundi við leiðsluna í Herfølge mánakvøldið, har hann fekk eitt uppskot um nýggjan sáttmála.

– Eg segði við teir, at eg gjarna vildi hava nakrar dagar at umhugsa tilboðið, og vit gjørdu so av, at vit skulu hittast aftur hóskvøldið.

Um tilboð aðrastaðni frá, sigur Jákup, at har hevur so einki ítøkiligt verið á skránni enn. Spurdur um nakri sonevndir følarar hava verið, svarar hann, at okkurt smávegis hevur verið, men at einki víðari er hent við hesum enn.

Annars vísur Jákup á, at umframt sáttmálan hjá sær eru eisini fleiri aðrir leikarasáttmálar í felagnum, sum ganga út hetta kappingarárið. Hann vildi tó ikki siga nakað um, hvørt hetta kundi ávirka støðutakan hansara.

Kanska heim

Annars tykist tað serliga vera útmeldingin hjá Jákupi um, at hann møguliga fer heim aftur til Klaksvíkar at spæla, sum tykist hava skapt áhuga í donsku miðlunum.

Týskvøldið sást føroyingurin tosa við sjónvarpsliðið hjá danska TV3, har hann greiddi donsku hyggjarunum frá, at tað væl kundi vera, at hann fór heim aftur til Føroya.

– Verður tað soleiðis, so fari eg at halda fram í nøkur ár sum áhugaleikari, segði Jákup við sjónvarpsstøðina, og legði afturat, at møguleikarnir fyri hesum í løtuni vóru fifty-fifty.